Hundaland

Høgni Debes Joensen

Sjúka nevnd skurv hevur leingi verið kend hjá seyði í Føroyum[17]. Hon kemur fyri ymsastaðni í landinum hvørt ár, serliga á heysti og vetri. Landsdjóralæknin kennir seg sannførdan um, at skurv — ella illa sjúka — er sama sjúkan sum orf[1].

Orf (ecthyma contagiosum) er ein smittandi húðsjúka hjá seyði ella geit, og situr sjúkan serliga á varrunum á ungum djórum. Hon tykist koma fyri hjá seyði um allan heimin og er vanligast seint á sumri, á heysti og á vetri. Vanliga varir sjúkan hjá seyði 3—5 vikur. Til ber at koppa seyð fyri hana[4], [10]. Ecthyma contagiosum kann í ávísum førum elva týðandi fíggjarligan miss, lutvíst orsakað av, at seyðurin missir holdini ella doyr[4] og lutvíst av tí, at menn av ótta fyri at verða smittaðir sýta fyri at royta seyðin[11].

Ecthyma contagiosum (orf) sum sjúka hjá fólki verður hildin at vera kend um allan heim, har seyðahald er. Í bókmentunum eru kortini bert fá og spjødd dømi um hesa sjúku. Fyrsta ritgerðin um orf hjá fólki í USA og Onglandi eru frá 1930 árunum[13], [15], [16]. Fyrstu greinirnar um sjúkuna í Norðurlondum eru úr Noregi og Føroyum[7], [8].

Av tí at fleiri rithøvundar í nógv ár hava sagt frá, at fyrsta fólkasmittan við orf verður lýst í grein eftir Hansen (Noreg) 1879, eitt nú Hatziolos[5], Hodgson — Jones[6], Nagington[12], Parnell[14] og Carr[2], eigur her at verða gjørt vart við, at grein G. Hansens ikki snúði seg um orf hjá fólki, men afturímóti um »en egen sygdom (kopper?) hos geden i Norge«. Ongastaðni í greinini verður nakað nevnt um orf hjá fólki[3].

Hundaland hevur leingi verið kent í Føroyum sum húðsjúka hjá

Læknadømi	Starvsaldur ár	Kenna sjúkuna	Tilburðir seinastu 5 árini ella í starvinum
1. Klaksvík	15	ja	5
2. —	1	-	3
3. —	5	-	1
4. Fuglafirði	18	-	20
5. Skála	8	-	5
6. Runavík	2	-	0
7. Vestmanna	5	-	20
8. Vágum	1	-	5
9. Tórshavn	12	-	25
10. —	26	-	15
11. —	33	-	20
12. —	3	-	5
13. Sandoy	1	-	0
14. Tvøroyri	7	nei	0
15. —	2	-	0
16. Vági	1	-	0

1. talva

fólki, ið stutt frammanundan hava fingist við seyð ella seyðaavroð. Tað hevur sostatt verið greitt, at tað snýr seg um eina smittandi sjúku í sambandi við seyð, men smittuevnið var ókent til fyrst í 1970-árunum.

Eftir gjøgnumgongd av bókmentum um húðsjúkur, ið smitta frá djórum til fólk, og um virussjúkur í húðini, varð funnið so nógv líkt millum hundaland og sjúkuna ecthyma contagiosum (orf), at hildið var hóskandi at kanna eftir, um orsøkin til hundaland var orf-virus.

Tveir húðvertir frá monnum í Føroyum, ið høvdu hundaland, vórðu í 1970 gróðursettir bæði á apunýra gróðurevni og amniongróðurevni frá fólki í 6 vikur, men eingin virus varð ávístur[9].

Av tí at orf-virus hevur sýnt seg at vera torførur at ala, varð nýggj roynd at ávísa orf-virus frá hundalandi gjørd í 1971-72, hesa ferð sum kanning í elektronsjóneyku. Úrslitið varð, at orf-virus bitlar vórðu funnir í øllum teimum kannaðu húðvertunum[8]. Hetta saman við teirri meinlíku sjúkumyndini staðfesti, at sjúkan hundaland er tann sama, ið aðrastaðni verður nevnd ecthyma contagiosum ella orf.

Síðan vóru send út spurnarbløð til allar kommunulæknar í Føroyum til tess at fáa hesa sjúku betur lýsta, og tað er um úrslitið av hesi kanning, ið nærri skal verða sagt frá her.

Tilfar og kanningarháttur:

Í 1972-73 vórðu fyrispurningar settir øllum kommunulæknum í Føroyum, og roynt var at fáa øll læknadømini at verða umboðað. Av 17 spurnarbløðum vórðu tilsamans 16 aftursend og svarað.

Úrslit:

Ein partur av upplýsingunum er settur í 1. talvu. Vit síggja at 13 av 16 læknum kendu sjúkuna hundaland. 10 læknar høvdu í virki sínum sum kommunulæknar sæð fleiri tilburðir. Eftir upplýsingunum kann leysliga verða mett, at tað eru einir tveir til tríggir tilburðir í hvørjum læknadømi um árið, ella um leið 25 tilburðir í Føroyum um árið, um so er, at sjúkan finst ikki í teimum økjum, har læknarnir kenna hana ikki. Oftast kemur sjúkan fyri hjá monnum. Allir aldursbólkar tykjast kunna fáa sjúkuna, av tí at yngsti sjúklingurin var 5 og elsti 71 ár.

Staður: Hundaland situr oftast á hondunum, serliga á fingrum. Av og á eru tilburðir við hundalandi á fótleggi, armi ella í andliti. Vanliga hevur sjúklingurin bert eitt hundaland, hendir seg tvey.

Útsjónd: Hundaland byrjar sum reyður blettur ofta á einum stað har eitt prus var frammanunndan. Bletturin gerst so við og við størri og tjúkkari og verður 1-4 cm til støddar. Eftir 4-14 døgum er at finna ein vágkendur blettur í miðjuni, og nakrar dagar seinni sæst ein myrk skruva ella ein myrkur blettur í miðjuni, umgyrd av



1. og 2. mynd. *Hundaland á vinstra tumli hjá 61 ára gomlum manni. Hevur vart 3 vikur. Eina viku frammanundan hevði hann limað eitt krov sundur. Gevið gætur eftir myrka blettinum í miðjuni, ið er umgyrdur av einum gráum ringi.*

einum gulum ella gráum ringi við roða uttanum (1. og 2. mynd). Seinni kemur í summum førum ein reydligur vøkstur upp úr tí sjúka økinum. Guli liturin í hundalandinum hevur javnan freistað læknar til at gera lítlan skurð, men vanliga kemur eingin vágur burturur.

Hundalandið lekist vanliga eftir 2-4 vikum, men kunnu ganga 1-9 vikur.

Eftirrák: Eftirrák av hesi sjúku sæst vanliga ikki, men við hvørt kann koma sárbruni elvdur av bakterium í hundalandi, stundum við bruna í gróðrarvatnsæðrum og eitlum og við fepri. Í einstøkum førum hevur útbrot verið um allan kroppin í sambandi við hundaland.

Viðgerð: Tað, ið oftast ger, at sjúklingur fer til lækna, er ótti, útsjóndin av hundalandi ella forvitni. Sjúklingar fara eisini stundum til lækna av pínu ella skriða; hendir seg tí sjúkan tarnar arbeiði, ella tí at hundalandið sær ljótt út.

Vanliga hava fólk havt sjúkuna 7-14 dagar, áðrenn tey fara til lækna. Oftast eru tey eina ella tvær ferðir hjá lækna fyri hundaland, uttan í teimum førum har sum eftirrák er.

Viðgerðin, ið nýtt hevur verið, er ymisk. Nakrir av læknunum brenna hundalandið, aðrir viðgera við lapispensling ella -salvu, skaving ella við antibiotika.

Flestallir læknar hildu annars, at tað vóru ikki øll, ið leitaðu sær ráð hjá lækna fyri sjúkuni. Eingin lækni hevði kunnleika um gomul heimaráð fyri sjúkuni, men einstakir vistu um konur, ið tóku sjúklingar í viðgerð fyri hundaland.

Órin (immunitetur): Upplýsingar eru um tríggjar menn, ið hava havt hundaland tvær ferðir við tveimum ella fleiri árum ímillum.

Vanligasta árstíð: Hundaland er vanligast í oktober-desember, men tað kann eisini koma fyri aðrar tíðir. Sum heild hildu læknarnir, at sjúkan kom fyri við ymiskum títtleika, so at tað kundu ganga fleiri ár í senn við heilt fáum tilburðum, og síðan kundi koma eitt ár við nógvum.

Smittuatvold: Næstan í øllum førum minnast fólk, at tey hava havt samband beinleiðis ella óbeinleiðis við seyð stutt fyri sjúkutilburðin. Tíðin frá sambandi við seyð til sjúkan kemur til sjóndar er ymisk, 1-14 dagar.

Í fleiri førum kunnu fólk siga frá, at tey hava havt eitt prus ella sár, har hundalandið seinni kemur fram. Hetta prusið var ofta komið, meðan tey høvdu fingist við seyð, oftast í sambandi við fletting ella tá ið seyðarhøvd vórðu sviðin. Við hvørt hevur onkur fingið sjúkuna, sum hevur verið stútaður av seyði, etið skerpikjøt, viðgjørt skinn ella givið seyðabollar. Í einstøkum førum er sjúkan komin í, aftan á at fólk hevur rent seg móti seyðakrubbu ella loftsbita í rúmi, har seyður hevur hildið til fleiri mánaðir frammanundan.

Umrøða:

Eitt tað fyrsta, sum ein varnast tá ein hyggur at 1. talvu er, at sjúkan var ókend av øllum trimum læknunum í Suðuroy. Hetta kundi fingið ein til at hildið, at sjúkan ikki finst har.

Skurv hevur verið kent sum sjúka í Føroyum leingi[17]. Landsdjóralæknin er sum áður nevnt sannførdur um, at skurv er sama sjúka sum orf, og hóast tað enn ikki eru gjørdar rannsóknir av slíkum sjúkum seyði, man einki vera at ivast í, at tað er sama sjúka[1]. Sambært upplýsingum landsdjóralæknans finst skurv eisini hjá seyði í Suðuroy. Tá havt verður í huga, at seyður í Føroyum javnan verður fluttur oyggjanna millum, er hetta eisini ógvuliga trúligt.

Hundaland er vanliga ikki nøkur ring sjúka hjá fólki og er tí lítið umrødd. Av somu orsøk man tíðin hava verið so drúgv til sjúkuorsøkin varð staðfest.

Óvist er, um sjúkan ger seyðinum í Føroyum nakran mun. Landsdjóralæknin metir, at sjúkan hevur ongan týdning. Ávísar frásagnir frá øðrum londum kundu bent á, at hundaland í serligum førum kann elva til týðandi fíggjarligan miss orsakað av sjúku ella deyða millum seyð. Tað kundi tí møguliga verið gagnligt at gjørt nærri kanning av skurvsjúkuni hjá seyði í Føroyum.

HEIMILDIR

1. *Bærentsen*, D. J.: 1971 (munnlig upplýsing).
2. *Carr*, R. W.· Alaska Med. 10: 75 (1968).
3. *Hansen*, G.. N. Tidskr. for Vet. 9: 298 (1879).
4. *Hart*, L., Hayston, J. T. og Keast, J. C.: Aust. Bet. J. 25: 40 (1949).
5. *Hatziolos*, B.: L'ecthyma contagieux du mouton. Diss. Paris 1929.

6. *Hodgson-Jones,* J. S.: Brit. med. J. 1: 795 (1951).
7. *Høvding,* G.: Nord. Med. 58: 1089 (1957).
8. *Joensen,* H. D. and Bloch, B.: Acta path. microbiol. Scand. Section B. 82: 311-317 (1974).
9. *Joensen,* H. D. og Hornsleth, A.: Negativt úrslit av gróðursetningarroyndum fyri hundaland. Ikki prentað. (1970).
10. *Kerry,* J. B. and Powell, D. G.: J. Vet. Tec. 38: 671-672 (1971).
11. *Kewish,* O. K.: Br. Med. J. p. 356 (1951).
12. *Nagington,* J.: Brit. Med. J. 2: 1324 (1961).
13. *Newsom,* I. E. and Cross, F.: J. Amer. Vet. Med. Assoc. 84: 799 (1934).
14. *Parnell,* A. G.: Brit. J. Oral Surg. 3: 128 (1965).
15. *Peterkin,* G. A. G. and Edin, M.R.C.P.: Brit. J. Derm. Syph. 49: 492 (1937).
16. *Schock,* A. Arch Derm. Syph. 39: 1040 (1939).
17. *Svabo,* J. C.: Indberetninger fra en rejse i Færøe 1781 og 1782, bls. 208, 1. ed. Selskabet til udgivelse af færøske kildeskrifter og studier, København 1959.

SUMMARY

»Hundaland« has long been known in the Faroe Islands as a skin disease in individuals who have recently been in contact with sheep. In the early 1970s it was identified as *ecthyma contagiosum* or *orf.*

The main object of the present paper is to describe the pathological picture based on information from medical officers in the Faroes. The estimated number of cases is 25 a year. The disease occurs especially in males, and is most often localized to the hands. Usually there is only one red spot, growing larger and thicker. It usually heals in 2 to 4 weeks. Sometimes there are after-effects. Orf occurs most frequently in October-December.

It is argued that a thorough investigation should be made into orf in sheep.